**Skjal A**

**Fra:** Rannvá Sólheim
**Sendt:** 28. november 2018 09:28
**Til:** Almannamálaráðið <amr@amr.fo>; Eyðun Mohr Hansen <eydun.mohr.hansen@amr.fo>; Heri Petersen <heri.petersen@amr.fo>

**Emne:** Spurningur frá Trivnaðaðarnevndini til lm. nr. 14/2018

Til landsstýrismannin í almannamálum,

Í sambandi við viðgerð av løgtingsmáli nr. 14/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti (Hækkað inntøkumørk, stuðul og lægri mótrokning), hevur Trivnaðarnevndin nakrar spurningar, sum ynskiligt hevði verið, at fingið svar upp á, á fundinum í morgin, 29. nov.

1. Trivnaðarnevndin ynskir at fáa eina kostnaðarmeting upp á uppskotið.
2. Eisini fer Trivnaðarnevndin at biðja um eina útgreining av uppskotinum viðvíkjandi:
    - Hvørja upphædd (brutto og netto) kunnu støk við børnum (1, 2 og 3 børnum) fáa í dag og eftir at uppskotið er samtykt?
      Útgreina á familjuískoyti og aðrar fastar veitingar, so sum barnagjald til einsamallar uppihaldarar, serligt barnaískoyti, barnafrádrátt v.m.
    - Hvørja upphædd (brutto og netto) kunnu pør við børnum (1, 2 og 3 børnum) fáa í dag og eftir at uppskotið er samtykt?
      Útgreina á familjuískoyti og aðrar fastar veitingar, so sum barnafrádrátt v.m.

Vinarliga

Rannvá Sólheim
Nevndarskrivari/løgfrøðingur

tel. 363900 • tel. beinl. 363913 og 277743
rannvas@logting.fo • logting@logting.fo • www.logting.fo